ítróttur

Nr. 135 • týsdagur • 19. juli 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tony Paris er í grannalagnum

**Men sambært nevndini í KÍ verður meistaravenjarin frá 1999 ikki venjari í ár, tí Oddbjørn Joensen eigur ábyrgdina, sum er stór í royndini at sleppa klaksvíkingum undan eyðmýkjandi niðurflyting**



*Tony Parris var venjari, tá KÍ síðst gjørdist meistari í 1999. Nú vitjar hann aftur á gamlar gøtur*

*Savnsmynd*

KÍ

*Jóannes Hansen*

Tað er ringur fótbóltshýrur í Klaksvík. TB legði rygg til stórtap í Vági sunnudagin. Tað er einsasta orsøkin til, at KÍ ikki er isolerað á niðurflytingarplássinum. Fótbóltsáhugin hevur altíð verið og er stórur, og ússaliga støðan hjá flaggskipinum, sum áður hevur givið klaksvíkingum so nógvar sigrar og so nógv at fegnast um, liggur sum dýna yvir fótbóltshugaðu norðoyingunum.

Í síðstu viku og ikki minst undir uppgerðini í góðveðrinum ímóti HB varð stóra søgan, at nú var Tony Paris á veg aftur til Klaksvíkar. Søgan segði, at hann skuldi koma síðsta leygardag ella í gjár, og tað var heilt víst, at hann skuldi taka venjaraábyrgdina á seg.

Eitt eru søgur og annað er veruleiki.

John William Joensen, sum er talsmaður hjá KÍ, staðfestir, at Oddbjørn Joensen hevur sáttmála við KÍ um at vera venjari tað, sum er eftir av hesum árinum, og soleiðis verður tað.

- Vit hava álit á Oddbirni. Hann hevur torføra og stóra uppgávu. Oddbjørn og hjálparvenjarin Leif Olsen arbeiða av lívsins kreftum fyri at bjarga felagnum plássi í bestu deildini. Stigatalvan boðar frá, at støðan er álvarssom, og tað er alneyðugt at vinna fleiri dystir og skava stig saman. Tað verður ikki lætt, men hóast talan gjørdist um tvey tap, so vóru avrikini og hugburðurin ímóti B36 og HB á heimavølli so mikið góð, at vit kenna tað sum um, at gongdin er við at venda. Men tað verður torført.

*Hvat við søguni um Tony Paris?*

- Tony Paris kemur til Klaksvíkar. Eg veit ikki heilt víst, nær hann kemur, men hann kemur ikki í hesi vikuni. Um hann kemur í næstu viku, veit eg ikki, men um hann ikki kemur í næstu viku, so fer hann at koma um ólavsøkutíðina.

*Hava tit bjóðað honum at koma henda vegin?*

- Nei, tað hava vit ikki. Tað er týdningarmikið fyri okkum at undirstrika, at vit hava álit á venjaranum, sum vit nú hava. Tony Paris kemur á privata vitjan í Klaksvík. Hann hevur búð her í tveimum skiftum. Fyrra ferðin var síðst í sjeyti árunum, tá ið hann var her í tvey ár, og í 1999 var hann aftur, og ikki minst ta ferðina var hann væl umtóktur og vann sær nógvar vinir. Tað eru Klaksvíkina og vinfólkini, sum hann kemur higar at heilsa uppá, sigur John William Joensen.

## Paris og framtíðin

John William Joensen váttar, at ætlanin er, at ábyrgdarpersónarnir í KÍ skulu heilsa upp á fyrrverandi meistaravenjaran, tá ið hann kemur henda vegin:

- Vit arbeiða við at fáa felagið aftur á føtur, og vit vóna og vænta, at hetta fer at koma upp á pláss um ikki so langa tíð. Í løtuni ræður tað í ítróttarliga partinum um at bjarga besta liðnum, sum higartil ikki hava verið við í ár, sigur John William Joensen uttan at vera meiri ítøkiligur, og so heldur hann fram:

- Tað er eingin loyna, at tað hevur staðið illa til fíggjarliga. Felagið hevur verið fastrent, men nú vóna vit, at tað fer at loysna, so vit fara at fáa arbeitt. Tá ið hetta verður komið upp á pláss, so verður møguleiki at hugsa um framtíðina, og tað er í tí sambandinum, at vit fara at tosa við Tony Paris. Hann var væl umtóktur í Klaksvík, og hann hevur støðugt havt áhuga fyri KÍ. Hann fylgir væl við, og hann veit, hvussu støðan er í løtuni. Um hann fer at verða venjari í Klaksvík næsta ár, duga vit ikki at siga. Vit fara at tosa við hann, og so fáa vit at síggja, hvat fer at spyrjast burturúr. Tað er nógv, sum skal viðgerast og fáast upp á pláss, áðrenn avtala um næsta ár fer at kunna gerast. Men vit vóna, at tað ikki fer at ganga ov rúm tíð, áðrenn tað fer at bera til at taka avgerðir um hetta, sigur John William Joensen, talsmaður hjá KÍ.

Síðani Tony Paris fór úr Føroyum fyri seks árum síðani, hevur hann búð í Florida, har hann er lærari og ítróttarstjóri á skúla. Ein partur av starvinum hjá honum er at ferðast í Europa og finna fótbóltsevni. Í fjør var hann í Skandinavia, og nú er hann aftur her á leið. Tað er í tí sambandinum, at hann aftur fer at vitja her.

Tony Paris ætlar sær at heilsa upp á spælarar og at síggja fótbóltsdystir, tá ið hann kemur henda vegin.

Skoðsmálið, sum fyrrverandi KÍ venjarin, fekk var, at hann megnaði at vinna sær stórt álit millum klaksvíkingar og ikki minst KÍ stuðlarnar. Hann átti stóra virðing millum spælararnar, sum hann bankaði í góða venjingarstøðu, og tað taldi nógv, hóast tað ikki varð mett, at Tony Paris var serliga stinnur í taktiska partinum av fótbóltsspælinum.

Síðani hann fór úr Klaksvík fyri seks árum síðani hava søgur gingið um, at hann skuldi vera áhugaður í at venda aftur henda vegin. Tað sigst ikki hava ligið so væl fyri hjá honum higartil. Men nú siga álítandi keldur, at hann hevur hug til tað.

Spurningurin er so, um semja fer at fáast um tað, og um KÍ næsta ár fer at verða umboðað í bestu deildini!